# Vit fáa tevatn og breyð

Eg tykkum skal  fortelja um mín fyrsta túrin til sjós,
eg spýði sum ein barnakona, tó helt eg mína kós.
*Vit fáa tevatn og breyð, teir virða okkum sum seyð,*
*tað besta sjómanslívið er, so syngja vit tju-hey.*

2. Skiparin hann drakk bæði øl og akvavit,
men um hann einki annað fekk, so noyddist hann við spritt.
*Vit fáa tevatn og breyð ...*

3. Stýrimenninar báðar eg ongantíð sá,
tí øðrum sigldu vit undan, og hin í koyggjunni lá.
*Vit fáa tevatn og breyð ...*

4. Kokkurin var góður, hann dugdi síni ting,
men feilurin var bert tann, at hann aldri kom í sving.
*Vit fáa tevatn og breyð ...*

5. So komu vit ein dagin inn til Aberdeen,
har hildu vit politistar og konufólk til grin.
*Vit fáa tevatn og breyð ...*

6. Har kom ein politistur, segði: “Where do you come from?”
Annar segði Føroyum, og hin hann segði Rom.

7. So fóru vit ein dagin inn á Hotel Bonaccord,
eg gekk mær fram til diskin, presenteraði meg sum lord.
*Vit fáa tevatn og breyð ...*

8. Har kom ein direktørur og bukkaði fyri mær
og beyð mær at koma at pimpa saman við sær.
*O, sum hann bukkaði, o, sum hann sukkaði,*
*og eg bleiv verandi lordur, til tað lukkaði.*

9. Hann átti eina dóttur, hon filmaði til mín
og beyð mær at koma í songina til sín.
*O,  sum tey bukkaðu, o, sum tey sukkaðu,*
*og eg bleiv verandi lordur til tað lukkaði.*

10. Hon spurdi um slottið, og hvaðan eg var frá.
Eg kysti hana og segði, at norðaliga tað lá.
*O, sum hon tá var glað, eg ikki lúgvi tað,*
*at dagurin var komin, áðrenn eg fór avstað.*

11. Men hevði hon vitað, tað var eitt fiskifar,
og leiðin gekk á Suðurlandið, har sólin aldrin sær.
*Nei, tá kom hon ikki við, tá hevði eg fingið frið,*
*tí eg hevði fingið fótin í afturpartin, you see.*

12. Men henda góða genta hon mundi duga gand,
tí henda sama túrin sigldu vit skipið upp á land.
*Nei har var hon ikki við, nú havi eg fingið frið,*
*og eg fekk ikki fótin í afturpartin, you see.*

12.Um hetta góða sjólív eg hevði altíð droymt,
men hesa góðu gentu havi eg aldri síðan gloymt.
*Vit fáa tevatn og breyð, teir virða okkum sum seyð,*
*tað besta sjómanslívið er, so syngja vit tju-hey.*

Bjarni W. Joensen yrkti, og lagið er Fra Engeland til Skotland. Teksturin er at finna í Grønu sangbók nr. 274. Tað er rættiliga vanligt, at kvæðir og vísur broytast eitt sindur í brúki, og soleiðis er í hesum føri. Omanfyri er vísan skrivað, sum vit í Eysturoyar dansifelag kvøða hana. Vónandi tekur eingin tað illa upp. jd.